# Vælkomin á Eystanstevnu!

Góðu stevnugestir. Farið er um longsta dag, og vit hava násummar. Fleiri summarstevnur hava longu verið, og komandi vikuskifti er tað Runavíkin sum bjóðar gestum vælkomnum á eeystanstevnu.

Fyrsta eystanstevnan var hildin í 1961, og hevur hon síðan verið hildin á hvørjum ári.

At fyrireika eina stevnu er ógvuliga krevjandi, og serliga nú so nógv onnur tiltøk eru at fara til.

Serliga er kappingin hørð frá teimum ymisku festivalunum sum eru runt um í landinum. Tað veri seg báta- ella tónleikafestivalar.

Meðan tær fyrstu stevnurnar fyri tað mesta vóru skipaðar sum ymisk ítróttartiltøk, so verður nógv meira gjørt burturúr í dag.

Hyggja vit eftir skránni fyri eystanstevnuna í ár, má sigast at sera nógv er gjørt burturúr. Her kann av sonnum sigast, at her er nakað fyri øll. Umframt kappróður og formulafótbólt, so er nógv annað á skránni bæði til gaman og álvara.

Ár telur kappróðurin við í kappingini um føroymeistarheitið, og nú so tætt er millum fremstu bátarnar, kann vantast at nógv fólk kemur at hyggja eftir kappróðri. Eisini er spennandi formuladystur á skránni.

Fyrireikararnir, ítróttarfeløg og skótar, hava lagt allar kreftir í, fyri at vit fáa eina so góða stevnu sum møguligt. Vónandi koma nógvir gestir á vitjan, so vit kunnu gleðast um eitt gott úrslit, tá vikuskiftið er av.

Hjartaliga vælkomin á eystanstevnu!

**Runavíkar kommuna**



*Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri*

